




*Jákup Sólstein, sum gevst í starvinum hjá JFK, har hann hevur verið í 52 ár*

**Hvussu kennist tað at hava havt tín seinasta arbeiðsdag hjá JFK?**

- Tað kennist ikki serliga væl, men einaferð skal mann gevast. Eg gjørdi av, at tá eg fylti 70 ár, skuldi eg gevast, og tað havi eg nú gjørt.

**Hvat hevur verið tann størsta hendingin hjá JFK hesi árini?**

- Tað tori eg ikki at siga, men síðst í 50'unum komu línubátar, og mitt í 60'unum hevði fyritøkan tríggjar trolarar og tríggjar línubátar seinni í 60'unum, so tá var sera nógv virksemi í felagnum.

**Hvat hevur verið tað keðiligasta hesi árini?**

- Krepputíðin í Føroyum í 90'unum rakti eisini JFK, og tá fór nógv fyri bakka, men tíbetur kom gongd á tað mesta av virkseminum aftur í Klaksvík.

**Hvussu kennist tað, at tú ikki skalt aftur til arbeiðis hjá JFK?**

- Nú havi havt tíð at hugsa um tað. Eg eri glaður fyri, at eg kláraði at arbeiða, líka til eg varð 70 ár, og eg eri avkláraður við, at eg nú gevist.

# Stóratjørn II




Býráðið ætlar at leggja ein kirkjugarð við Stórutjørn

## Í MORGIN




Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum og regn eitt skifti, annars sirm ella mjørki,, men onkur sólglotti. Hitin millum 11 ofg 14 stig, men har mjørki legst um 10 stig.

## SUNNUDAGIN




Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.

## MÁNADAGIN




Fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin fríska hann vindin av norði. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1010 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og brúgvaløgini við Føroyar fara spakuliga eystureftir.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað og viknar nakað. Brúgvalagið sunnan fyri Føroyar stendur mestsum í stað, men fer sum frálíður suðureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 6 | Tromsø | 4 | Moskva | 19 | Athen | 24 |
| Reykjavík | 10 | Bergen | 8 | Berlin | 15 | Beijing | 22 |
| Tórshavn | 3 | Oslo | 11 | Paris | 16 | New Dehli | 38 |
| Lerwick | 5 | Stokkhólm | 8 | Madrid | 16 | Bangkok | 38 |
| Aberdeen | 10 | Keypmannah. | 8 | Róm | 19 | Sydney | 23 |
| London | 9 | Helsinki | 4 | Malorca | 21 | New York | 11 |

## VESTFALLSKYRRINDI

20. mai Mánin næstur jørðini
21. mai Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. mai | 01:01 | 13:38 | 00:01 | 12:38 | 00:16 | 12:53 | 03:01 | 15:38 | 04:01 | 16:38 | 11:53 | - | 10:53 | 23:31 | 01:16 | 13:53 | 02:16 | 14:53 | 00:46 | 13:23 | 02:01 | 14:38 |
| 22. mai | 02:16 | 14:53 | 01:16 | 13:53 | 01:31 | 14:08 | 04:16 | 16:53 | 05:16 | 17:53 | 00:31 | 13:08 | - | 12:08 | 02:31 | 15:08 | 03:31 | 16:08 | 02:01 | 14:38 | 03:16 | 15:53 |
| 23. mai | 03:31 | 15:54 | 02:31 | 14:54 | 02:46 | 15:09 | 05:31 | 17:54 | 06:31 | 18:54 | 01:46 | 14:09 | 00:46 | 13:09 | 03:46 | 16:09 | 04:46 | 17:09 | 03:16 | 15:39 | 04:31 | 16:54 |
| 24. mai | 04:18 | 16:42 | 03:18 | 15:42 | 03:33 | 15:57 | 06:18 | 18:42 | 07:18 | 19:42 | 02:33 | 14:57 | 01:33 | 13:57 | 04:33 | 16:57 | 05:33 | 17:57 | 04:03 | 16:27 | 05:18 | 17:42 |
| 25. mai | 05:07 | 17:32 | 04:07 | 16:32 | 04:22 | 16:47 | 07:07 | 19:32 | 08:07 | 20:32 | 03:22 | 15:47 | 02:22 | 14:47 | 05:22 | 17:47 | 06:22 | 18:47 | 04:52 | 17:17 | 06:07 | 18:32 |